

MYND: ÁLVUR HARALDSEN

Effodeildin støðan

NR.	LIÐ	DYSTIR	VUNNI	JAVNT	TAPT	+ MÁL	- MÁL	+/-	STIG
1	AB	0	0	0	0	0	0	0	0
2	B36	0	0	0	0	0	0	0	0
3	EB/Streymur	0	0	0	0	0	0	0	0
4	HB	0	0	0	0	0	0	0	0
5	ÍF	0	0	0	0	0	0	0	0
6	KÍ	0	0	0	0	0	0	0	0
7	NSÍ	0	0	0	0	0	0	0	0
8	TB	0	0	0	0	0	0	0	0
9	FC Suðuroy	0	0	0	0	0	0	0	0
10	Víkingur	0	0	0	0	0	0	0	0

Toppskjúttin og ársins spælari í fjør, Adeshina Lawal, verður fremsti maður, og Andy Olsen, André Olsen og Sjúrður Jacobsen eru nýggju menninir, sum í kappin við Dánjal á Lakjuni, Ara Ó. Ellingsgaard og Nenad Saric skulu syrgja fyri uppleggunum.

Grannauppgerð í Gundadali

HB - AB

Hjá HB restaði eitt stig í at vinna FM heitið í fjør. Tað vóru fleiri dystir, har favorittarnir ikki megnaðu tað, sum tað varð roknað við. Ein var, tá ið AB í 17. umfari fór úr Gundadali við 2-1 sigri. Sunnudagin vitjar AB aftur í Gundadali.

Heðin Askham fer nú undir annað av trimum kappingarárum sum HB venjari. Setningurin er at vinna gull í landskappingini og steypakappingini. Í fjør var úrtøkan stór, men HB vann einki gull, og venjarin leggur trýst á seg sjálvan undan kappingarbyrjan:

– Um vit ikki megna úrslitini, so er eingin orsøk til, at eg verði verandi í felagnum. Málið er greitt, og tað er at røkka eitt stig hægri enn í fjør bæði í landskappingin og steypakappingini, sigur Heðin Askham.

Stóri spenningurin í HB er, hvussu tað fer at svinga í álopinum, har Andrew av Fløtum nú hevur fingið Arnbjørn Hansen undir liðina á sær.

Fyri fyrstu ferð nakrantíð fer AB undir triðja kappingarárið á rað í bestu deildini.

– Hetta er tó ikki nóg mikið til at staðfesta, at AB er rótfest í bestu deildini, men gongdin er avgjørt rætta vegin, sigur AB venjarin Oddbjørn Joensen, sum fyrstu ferð hevði ábyrgdina á Argjum í 2007.

Málið hjá Oddbirni og spælarunum undan vitjanini í Gundadali er greitt:

– Vit hava verið plágaðir av vandanum at flyta niður ov leingi hesi seinastu árini. Tað er strævið. Tí ræður um hjá okkum at vera við beinanvegin, sigur AB venjarin, ið ætlar at hansara lið skal spæla fótbólt og ikki sparka bólt.

NSÍ miðjar eftir fjórða plássinum

NSÍ - FC SUÐUROY

Uppflytararnir í FC Suðuroy fara í morgin fyrstu av mongu ferðunum í hesum kappingarárinum norður um fjørðin. Harvið verður farið undir drúgva setningin, ið hevur sum mál, at FC Suðuroy skal varðveita plássið í fremstu rød, og at liðið næstu árini støðugt skal vera millum tey fremstu:

– Størsta avbjóðingin er at fáa spælararnar at trúgva uppá, at felagið skal eiga pláss í bestu deildini. Tað snýr seg um mentala og sinniliga partin, sum vit hava stórt fokus á. Hetta er avgerandi, um vit skulu røkka málinum, sigur Jón Pauli Olsen, venjari. Hann er ikki fegin um skipanina av fyrstu umførunum, tí FC Suðuroy skal spæla bæði í Runavík og í Klaksvík, áðrenn høvi verður at spæla á heimavølli – ímóti TB!

– Vit hava gjørt vart við hetta á røttum staði, og eg skilji ikki, at tað ikki bar til at broyta hetta, tá ið tað bar til at gera aðrar justeringar í skipanini, sigur FC Suðuroy venjarin.

Vertur hjá FC Suðuroy í fyrsta umfari er NSÍ, sum síðstu árini mest sum hevur tikið patent upp á fjórða plássið. Sambært Kinnu F. Olsen, sum hevur verið formaður og nú er næstformaður í felagnum, so er málið aftur í ár at røkka fjórða plássinum:

– Vit byggja framvegis upp, og vit dúva upp á egnar spælarar, sum vit geva tíð at mennast. At áhugin er sera stórur sæst eitt nú aftur í, at tað møta nógv til morgunvenjingarnar, sum Trygvi Mortensen stendur fyri.

Inngangurin avgerandi hjá TB

TB - KÍ

Í Klaksvík spenna teir bogan høgt í royndini at vinna seg fram á heiðursmerkjapláss. Mikkjal Thomassen er nýggjur við róðrið, og saman við honum eru tríggir fremmandir spælarar komnir til Klaksvíkar. Teir eru keyptir, tí tað verður roknað við, at teir skulu vera millum teir fyrstu ellivu. Tað ber við sær, at kappingin um plássini er stór¸ og at fleiri, sum í fjør spældu nógv, í fyrstu atløgu verða á beinkinum.

KÍ formaðurin, Tummas Lervig, sigur soleiðis um, hvat skal til:

– Um vit enda á fjórða plássi, so er talan um gott kappingarár, men vit vilja fegnir vinna atgongumerki til europeisku kappingina.

Í morgin fer KÍ um Suðuroyarfjørð, har TB sunnudagin tekur ímóti við Stóra í Trongisvági. Páll Guðlaugsson og hansara menn hava sum mál at varðveita plássið í fremstu rød, og teir vita, hvat hevur alstóran týdning:

– Tað hevur alstóran týdning, at vit sleppa væl frá fyrstu umførunum, og at tað harvið verður møguleiki at ríða á alduni. Undanvindur hjá TB hevur nógv at siga fyri alt lokalsamfelagið, sigur miðvallarin Rógvi Joensen. Hann heldur, at tað sær spennandi út, og at teir fýra útlendsku spælararnir fara at styrkja um liðið:

– Teir síggja út at hava dygdirnar, sum tað varð roknað við, men tað tekur tíð at spæla nýggju menninar inn á liðið, sigur Rógvi Joensen.

JOANNES@SOSIALURIN.FO



SAVNSMYND: ÁLVUR HARALDSEN

KÍ

Ikki við:
Ivan Joensen (Sjúkur)
Ivasamur:
Evrard Blé

ÍF

Ikki við:
Nenad Saric (Ryggurin, 2-3 vikur),
Jan Ó. Ellingsgaard (Burturstaddur)
Ivasamur:
Clayton Soares

AB

Ikki við:
Kristin R. Mouritsen (1,5 mánað)
Hørður M. Mohr (2 mánaðir)
Karstin Højgaard (1 vika)
Beinir Ellefsen

TB

Ivasamur:
Franck O. Able (Spæliloyvi)

FC SUÐUROY

Ivasamir:
Mamuka Toronjadze (Spælaraloyvið)
Valerian Lobashvili (Spælaraloyvið)